# ítróttur

Nr. 1 • mikudagur • 3. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tað sær spennandi út

**Favorittarnir í kvinnudeildini sluppu undan at hittast í hálvfinaluni, meðan hálvfinalurnar hjá monnunum verða tær somu sum í fjør**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyrrapartin týsdagin varð stuttur tíðindafundur hjá Poul Hansen, har lutur varð kastaður um, hvørji lið skulu hittast í hálvfinalunum í Coca-Cola kappingini.

Fýra navnaseðlar vórðu drignir hjá bæði monnum og kvinnum, og áðrenn hesir vórðu drignir, varð sagt frá, nær hálvfinalurnar skulu spælast.

Áður hevur tað annars verið soleiðis, at HSF hevur sett eitt evstamark fyri, nær dystirnir skulu spælast, men í ár eru dagarnir so fastlagdir.

24. og 31. januar eru settir sum leikdagar, tó at hetta helst verður broytt til 27. januar og 3. februar, um so er, at VB vinnur seg fram til hálvfinaluna. Hetta er enn ikki avgjørt, men í kvøld, mikukvøldið, skal fjórðingsfinalan millum Tjaldur og VB ætlandi avgerast.

### Favorittarnir hittast ikki

Hjá kvinnunum mundi størsti spenningurin vera um, hvørt VÍF og Stjørnan, sum í ár hava verið at kalla einaráðandi, fóru at bresta saman í hálvfinaluni, ella um talan møguliga verður um ein finaludyst millum hesi lið.

Tá luturin var kastaður, var tó greitt, at liðini sleppa undan hvørjum øðrum í hálvfinalunum, tí lutakastið lagaði seg soleiðis, at VÍF spælir móti Neistanum, meðan hin hálvfinalan verður millum Tjaldur/VB og Stjørnuna. Fyrr nevnda liðið hevur heimavøll í fyrra dystinum.

### Somu hálvfinalur

Hjá monnunum eru hálvfinaluluttakararnir tey somu fýra liðini sum í fjør, og lutakastið lagaði tað soleiðis, at dystirnir eisini verða teir somu.

Her lagaðis lutakastið seg soleiðis, at VÍF og Kyndil hittast í aðrari hálvfinaluni, meðan Neistin og StÍF skulu avgera, hvør seinni parturin í finaludystinum verður.

Einki er at ivast í, at talan her kann gerast um fýra sera áhugaverdar dystir, har væl kendu smáu marginalarnir væl kunnu koma at gera av, hvørji lið skulu taka lut í finaludystunum í Coca-Cola kappingini.

### Finaludysturin fluttur

Annars er sjálvur finaludysturin í kappingini fluttur í mun til undanfarin ár. Vanliga hevur fyrsta vikuskiftið í februar verið sett av til hetta, men orsakað av at U-20 landsliðið skal uttanlands at royna seg, verður hetta broytt í ár.

Ístaðin verður Coca-Cola finalan leikt 10. februar, og tá fæst so at vita, hvørji lið kunnu rópa seg steypavinnarar komandi árið.

Undan hesum skulu hálvfinalurnar avgreiðast, og sum nevnt, so eru dystirnir í hesum hesir:

**Menn**

| | |
|---|---|
| *24. januar* | VÍF-Kyndil |
| *24. januar* | Neistin-StÍF |
| *31. januar* | Kyndil-VÍF |
| *31. januar* | StÍF-Neistin |

**Kvinnur**

| | |
|---|---|
| *24. januar* | VÍF-Neistin |
| *24./27. januar* | Tjaldur/VB-Stjørnan |
| *31. januar* | Neistin-VÍF |
| *31. jan/3. feb* | Stjørnan-Tjaldur/VB |




*Høgni Hansen frá P/F Poul Hansen og Jógvan Martin Mørk frá HSF dreaga her navnaseðlarnar, sum gjørdu av, hvussu leikast skal í hálvfinalunum í Coca-Cola kappingini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Anand heimsmeistari

**Indarin nýttist bert fýra talv at avgera finaluna ímóti Alexei Shirov. Seks talv átti at telvast, men tá Viswanathan Anand hevði lagt seg á odda 3,5-0,5 varð dysturin longu avgjørdur. Anand er sostatt tann 15. Fide heimsmeistarin**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Fyri góðum tveimum mánaðum síðani bleiv Vladimir Kramnik somuleiðis heimsmeistari tá hann vann á Gary Kasparov. Hetta kann tykjast fløkjasligt, men støðan er tann at Kasparov ikki longur telvar um Fide heimsmeistaraheitið, sum er altjóða talvsamgongan, og tað hevur hann síðani 1993 ikki gjørt. Hann hevur á egnum beinum skipað talvsamgongur og við teimum eisini HM dystir. Í 1993 vann hann á Nigel Short, í 1995 á Anand og í ár vann Kramnik á honum.

Khalifman vann Fide HM í 1999, og sostatt heimsmeistari nummar fjúrtan, men spurningurin er um Kramnik er tann fimtandi og Anand tann sekstandi. Kasparov vil vera við at Kramik er tann 15. heimsmeistarin, men hesum vil Fide ikki ganga á møti.

Eins og í Boksing hava vit fleiri heimsmeistarar innan talv, í núverandi løtu tveir.

### Anand í serflokki

Finalan sum bleiv leikt í Teheran, Iran, um jólini, bleiv ikki eins spennandi sum væntað varð. Mannagongdin varð tann, at leikast skuldi seks talv og um tá á jøvnum stóð, so skuldi telvast kviktalv, tað vil siga at hvør telvari hevur 25. minuttir í part til talvið. Men hetta varð als ikki neyðugt, tí eftir bert fýra talvum varð greitt at 31 ára gamli Anand var heimsmeistari.

Anand hevði svarta fólkið í fyrsta talvinum og telvaði fyri fyrstu ferð í sjey ár fronsku byrjanina. Hetta loypti ivaleyst hvøkk á Shirov, sum ikki fekk tann stóra fyrimunin við sínum hvíta heri. Anand fekk hegnisliga ognað sær javnleik.

Í øðrum talvinum leikti Anand eina nýggjheit, og fekk avgerandi fyrimun, men Shirov vardi seg væl. Anand vann tó eftir drúgva leiktíð.

Triðja talvið mátti shirov tí vinna við hvíta fólkinum, men eftir at hava offrað býtismun telvaði Anand sum ein brandur og vann enn einaferð. Í fjórða talvinum satsaði Shirov alt, hann offraði heili tveir mans og fekk eisini Anand at ristast eitt sindur, men indarin helt høvdið kalt og vann talvið í stórum stíli, og harvið eisini heimsmeistaraheitið, og við hesum eina upphædd á 528.000 (uml. 4. mió. kr.) amerikanskir dollarar, meðan Shirov fekk 316.000 dollarar.

Anand telvaði heilt einastandandi og nærum feilfrítt, og er ein verdugur heimsmeistari.

Finaluúrslitið er kanska ikki heilt eftirfarandi tá hugsa verður um styrki Shirovs. Hann er betri enn úrslitið sigur, og hevði bert nakrar ringar talvdagar. Trupulleiki hansara er svarta fólkið ímóti teimu sterku, men hinvegin er hann øgiligur við hvíta fólkinum. Anand vísti seg tó at vera betur.

### Toppurin hittist aftur

Í krútsterku kappingini Wijk aan Zee í Hollandi fara nøvn sum Kasparov, kramnik, Anand, Shirov og aðrir superstórmeistarar at kappast í døgunum 18-28. januar.

Sera áhugavert verður at síggja kasparov hitta Kramnik aftur. Enn hevur Kasparov hægsta ratingtal í heiminum, men fyri fyrstu ferð í fimtan ár kann hann ikki kalla seg heimsmeistara.

Nógv gita og vóna at Kramnik og Anand fara at dystast um HM tittulin, ein sokallaðan World Prestige Match, eftirsum báðir kunnu kalla seg heimsmeistarar, men tó skal ein ikki vænta hetta blíva veruleiki.

### Talvið hesa vikuna

Í hesum fjórða talvi telvar Shirov beinhart og vilt, men Anand dugir sanniliga eisini at verja seg.

Anand,V (2774) - Shirov,A (2746)
FIDE WCh KO (4) 24.12. 2000

1.e4 e6 2.d4 d5 3.Ric3 Rif6 4.e5 Rifd7 5.Rice2 c5 6.f4 Ric6 7.c3 Fb6 8.Rif3 f6 9.a3 Be7 10.h4 0-0 11.Rh3 a5 12.b3 Fc7 13.Rieg1 a4 14.b4 fxe5 15.fxe5 Ridxe5 16.dxe5 Rixe5 17.Rixe5 Fxe5+ 18.Fe2 Bxh4+ 19.Kd1 Ff6 20.Rif3 Fxc3 21.Bb2 Fb3+ 22.Kc1 e5 23.Rxh4 Bf5 24.Fd1 e4 25.Fxb3 axb3 26.Rid2 e3 27.Rif3 Rae8 28.Kd1 c4 29.Be2 Be4 30.Kc1 Re6 31.Bc3 Rg6 32.Rh2 Bd3 33.Bxd3 cxd3 34.Kb2 d2 35.Kxb3 Rg3 36.Kb2 g5 37.Kc2 Rc8 38.Kd3 g4 39.Be5 Rc1 40.Rh1 Rxg2 41.Rih4 1-0



DAGFØR
TEG
Sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara,
so fært tú sosialin
5 ferðir um vikuna
til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76 110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Bústi.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Sosialurin



Sosialurin - 311820

**Stóra bringu**
**-ella lítla?**

Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-stødd?

Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína stødd.
Ring til okkum og avtala tíð.

Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.

Vit hava eisini korsilett í stórum støddum

siri
lív & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18
100 Tórshavn
Tel./Fax 316610

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

Fyri lærara í farloyvi verður søkt eftir
**Lærara**
til Eiðis skúla frá 1. januar 2001
og skúlaárið út.

Talan er um eitt tíðaravmarkað starv við uml. 26 tímum.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meira kann fáast at vita um starvið, við at venda sær til fyrstalæraran á tlf. 423579 (arbeiði) ella 443331 (heima).

Eiðis skúli hevur undirvísing 1.-7. árgangi. Vit eru 9 lærarar og 96 næmingar.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera Eiðis skúlanevnd í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 5. januar 2001.

**Eiðis skúlanevnd**
**v/ Dortheu K. Sørensen**
**470 Eiði**

REINAN BIL !
• Vit avfeitta og vaska
• Vaska innan sum uttan
• Bona, polera o.a.
• Vit heinta og seta bilin aftur
Sport Wheels, tel. 253352
Gripsvegur 26. Ringið og fái eina tíð. Opið kl. 8 - 20

*Vit vilja ynskja øllum eitt gott nýggjár við tøkk fyri tað brátt farna.*

***Klaksvíkar Róðrafelag***

**Heitlufts-aggregat til flest øll endamál**
• Refleks oljuovnar til bátin, summarhús o.a.
• Hoyggjturkarar til turkan av græsið - serframleitt til Føroysk viðurskifti!
• Gasovnar
• Hitakanónir
• Avfugtarir
Vit útvega eftir tygara tørvi!
Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008
Sosialurin - 311820

fk

TVINGSILSSØLA

**Hósdagin**
**tann 18. januar 2001**
**kl. 10.45**
verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir matr. nr. 45 Skálavík AS nr. 34/2000.

Stykkið er 686 m² við ástandandi bygningi til niðurrívingar.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Julionnu Klett, advokati, Bringsnagøta 15, 100 Tórshavn, tlf. 311744, j.nr. 88.394**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Søluuppgerð kann fáast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
tann 29. des. 2000